# Outlander - spennandi frítíðarbilur frá Mitsubishi

**Outlander er ein fimm persóna frítíðarbilur, sum fæst bæði við framhjólsdrift og sum 4x4, er avgjørt eitt spennandi tilboð frá Mitsubishi.**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Mitsubishi Outlander er ein stórur og rúmligur frítíðarbilur, sum fæst við bæði framhjólsdrift og sum 4x4* *Mynd: Álvur Haraldsen*

Mitsubishi Outlander sær avbjóðandi og sterkur út við kraftigum rør viðførisstativum á takinum. Framman sær hann út, sum hann vil nakað við stórum Mitsubishi logo millum bæði kølaragittarini.

Lyktirnar framman og aftan eru av nýggjasta sniðinum, har øll tey ymisku ljósini eru samlaði í somu lykt. Bilurin er meira ein frítíðarbilur enn ein jeepur, við tað at hann fæst bæði sum framhjóldrivin og sum 4x4.

Koyrieginleikarnir eru merktir av, at øll fýra hjólini er óbundin av hvørjum øðrum hvat upphangum og fjaðraskipan viðvíkur, hann er sum ein persónbilur at koyra.

Innan er alt einfalt og vælvirkandi, man situr høgt og útsýnið er gott allar vegir, eisini aftur eftir hóast hann hevur eina nakkastúttu til hvørt av teimum fimm sitiplássum.

Outlander er ein tryggur bilur við teirra egna RISE (Reinforced Impact Safety Evolution) karrossaríi, sum við ein samanstoyt gevur eftir har tað skal, og kabinan heldur sín form.

Bensinmotorurin er ein 2,0 litur 16V við 135 hk og koyrir frá 0-100 km/t upp á 10,7 sek. Hesin er ein Comfort og tann størri er ein 2,4 litur 16V við 163 hk 4WD Sport.

**Outlander prísirnir byrja úr kr. 258.000,-**

# Nýggjur Mitsubishi Colt í september

**Eftir ein steðg í nøkur ár kemur ein nýggjur Mitsubishi Colt, sum verður bygdur í Evropa til evropearar, á føroyska og danska marknaðin eftir summarfrítíðina. Colt var sýndur fram á Copenhagen Motor Show 2004**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Mitsubishi Colt er ein hatchback við fimm hurðum, sum verður bygdur á NedCar bilverksmiðjuni í Hálandi saman við Smart Forfour* *Mynd: Álvur Haraldsen*

Mitsubishi Colt komu fyrstu ferð á marknaðin í 1962 og til Evropa í 1978. Nýggi Colt, sum nú kemur á marknaðin, er eitt úrslit av samstarvinum millum Mitsubishi Motors og DaimlerChrysler.

Bilurin er ein hatchback við 5-hurðum, sum verður bygdur á NedCar verksmiðjuni í Hálandi saman við Smart Forfour.

Colt er ein rúmligur 5-persónabilur við liðiligari innrætting, har baksetrini kunnu flytast aftur og fram ella heilt takast úr bilinum. Høgt er til loftið og gevur tað størri rúm bæði aftan framman.

Tríggir MIVEC bensinmotorar verða at velja ímillum: 1,1 litur, 1,3 litur, og 1,5 litur. Seinni kemur ein 1,5 litur commonrail dieselmotorur. Eisini verður ein 6-trins automatgirkassi á skránni.

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar



# Barnavognin inn í bilin í heilum líki

**Citroën Berlingo er ein tann mest seldi familjubilurin í Føroyum. Hann kom fyrstu ferð á marknaðin í 1996, og bleiv beinanvegin væl móttikin av barnafamiljunum í Evropa og aðrastaðni við**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Citroën Berlingo er ein rúmligur og familjuvinarligur bilur. Her sýnir Rúna Dalsgarð, frá handlinum Barnaútgerð í Havn, hvussu lætt tað er at fáa ein barnavogn inn í bilin uttan at leggja hann saman* *Mynd: Jens Kristian Vang*

At seta seg inn í ein Berlingo í Modutop útgávuni er sum at koma inn í eitt flogfar, har eru ikki minni enn fimm loftvindeygu, fleiri hillar, skáp við lúkum, og ventilatiónsdysir. Til tey ferðandi á baksetrinum eru tvey smá borð, júst sum í flogførunum. Undir loftinum framman er ein fløguboks. Clim útgávan hevur eisini aircondition.

Undir loftinum í viðførisrúminum er eisini eitt rúmligt skáp. Ein Modubox innkeypsvognur er eisini við í keypinum.

Berlingo er ein fimm persónabilur, men eitt eykasetur kann setast inn í viðførisrúmið, sum annars er so stórt, at ein barnavognur passar inn uttan at skula leggjast saman.

Berlingo fæst við tveimum bensinmotorum við ávikavist 75 og 110 hk og tveimum dieselmotorum við 71 og 90 hk, sum er ein HDI motorur.

**Prísir úr kr 155.000**



*Starvsfólk hjá Ivan Johansen Bilum við ISO 9001 góðkenningini, f.v.: Jón Johansen, Leif Johansen, Áki Andreasen og Jógvan T. Joensen*

# Fyrstir við ISO 9001

**Ivan Johansen Bilar er fyrsta føroyska bilasølan við altjóða góðkenning á ISO9001:2000 stigi**

Fyri at lúka øll krøv og fáa endaliga góðkenning, hevur í drúgva tíð verið arbeitt við at fáa góðskuna og tænastuna hjá fyritøkuni at liva upp krøvini, sum góðkenningin krevur.

Skipanin ber í sær, at fastar mannagongdir eru um øll viðurskifti so sum starvsfólkapolitikk, samstarvsavtalur, amboðskanningar, goymslu, sølu. Og viðskiftafólk fáa nú spurnarblað, har tey kunnu siga frá, um tey eru nøgd við tænastuna hjá fyritøkuni ella ikki.






Ivan Johansen Bilar, Dinitrol:

# Verri tíðir meira rustviðgerð

**Ivan Johansen Bilar hava rustviðgjørt bilar í eini 30 ár, teir hava tí hollar royndir á hesum øki. Tað vísir seg, at tá tíðirnar blíva verri koma fleiri bilar til rustviðgerð fyri at fáa teir at halda longri**

RUSTVIÐGERÐ
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Hóast bilverksmiðjurnar geva fleiri ára rustgaranti, er tað bert garanti fyri gjøgnumtering innanífrá. Tað vil siga, at plátulutirnir á bilinum skulu vera tardir hol, áðrenn garantiið dekkar.

Fyri ikki at fáa trupulleikar við rusti, verður mælt til at rustviðgera bilin so skjótt sum gjørligt – tað er tó sjáldan ov seint og ongantíð ov tíðliga

Í 2003 vóru 404 bilar Dinitrol-rustviðgjørdir hjá Ivan Johansen Bilum, harav vórðu 92 bilar viðgjørdir tríggir teir fyrstu mánaðirnar. Tríggir teir fyrstu mánaðirnar í ár eru 115 bilar rustviðgjørdir, so talið er vaksandi. Málið fyri 2004 er 500 rustviðgerðir.

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar